Skjal C
til lm. nr. 37/2020

útreiðslubólkum, er komið fram til, at samlaða útreiðslan til almenna heilivágstilskotið verður umleið 58 mió. kr. í einum heilum fíggjarári.

Í 2010 verða útreiðslurnar til heilivágstilskot eftir teirri gomlu tilskotsskipanini í 1. ársfjórðingi, av tí at nýggja tilskotsskipanin ikki kemur í gildi fyrr enn 1. apríl 2010. Henda ársfjórðingin rinda Heilsutrygd og Almannastovan tískil heilivágstilskot eftir gomlu skipanini. Ein uppgerð av hesum verður gjørd sum broyting til fíggjarlógaruppskotið fyri 2010.

Allar verandi avtalur, sum sjúkrakassarnir hava við kommunulæknar, tannlæknar og onnur, sum veita heilsutænastur og sum verða fíggjaðar av sjúkrakassunum, verða førdar víðari í Heilsutrygd. Roknað verður tí við, at hesar útreiðslurnar verða á leið tær somu sum í dag. Hesar útreiðslur vóru í 2008: 64,5 mió. kr.

Ætlanin er, at gjaldið til Heilsutrygd fellur burtur í 2012. Eftir hetta skal skipanin verða ein vanlig útreiðslujáttan á fíggjarlógini. At avtaka gjaldið krevur eina lógarbroyting.

NB: Kan ikki at passa

Á fíggjarlógunum fyri 2010 og 2011 er ætlanin, at Heilsutrygd verður skipað sum ein landsfyritøka, har inngjaldið verður jattað sum ein inntøkujáttan á somu høvuðskonto, sum útreiðslurnar eisini verða játtaðar. Hetta hevur við sær, at nettojáttanin á fíggjarlógini hesi árini ikki verður ávirkað av hesi umleggingini.

Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Heilsutrygd verður skipað sum ein almennur stovnur undir Heilsumálaráðnum. Stovnurin kemur at taka sær av umsitingini av gjøldum og veitingum sambært sáttmálum við kommunulæknar og onnur í primeru heilsutænastuni, sum lógin leggur upp til. Harumframt umsitur Heilsutrygd heilivágstilskotsskipanina og avrokningar við Apoteksverkið í hesum sambandi.

Roknað verður við, at umsitingin av Heilsutrygd fer at kosta umleið 6 mió. kr. í 2010. Hetta er 2,7 mió. kr. minni, enn hvat umsitingin av 11 sjúkrakassum kostaði í 2007. Í roknskapinum fyri 2008 er umsitingin av sjúkrakassunum gjørd upp til 6,5 mió. kr.

Roknað verður við, at Heilsutrygd skal menna KT-skipanir, sum skulu brúkast í sambandi við umsitingina av lógini. Møguleiki er fyri at gagnnýta partar av talgildu heilsuskipanini í sambandi við samskifti og uppgerðir frá kommunulæknunum.

Broytingin í heilivágstilskotsskipanin hevur við sær, at apoteksverkið má gera umfatandi broytingar í sínum KT-skipanum. Roknað verður við, at apoteksverkið í fyrsta lagi kann verða klárt við nýggju skipanini til 1. apríl 2010. Apoteksverkið kemur at hava útreiðslur av at gera hesa broytingina í KT-skipanunum. Heilsutrygd skal fíggja hesar broytingarnar, sum eru mettar at kosta 3 mió. kr.

Nýggja heilivágstilskotsskipanin v.m. hevur eisini við sær, at fleiri umleggingar skulu gerast á Almannastovuni, sum eftir 1. apríl 2010 ikki skal umsita fleiri av skipanunum, sum veita tilskot v.m. í sambandi við heilsutænastur. Hesar uppgávurnar verða fluttar til Heilsutrygd. Tað snýr seg um generelt tilskot eftir pensjónslógini til pensjónistar, tá ið egingjaldið fer upp um ásetta markið, umframt ymisk tilskot eftir grein 17 og 18 í forsorgarlógini. Ein nærri uppgerð verður gjørd hesum viðvíkjandi, og í hesum sambandi skal eisini metast um, hvørjar tær umsitingarligu fylgjurnar eru.

Inngjaldið til Heilsutrygd verður umsitið av TAKS, sum í stóran mun kann gera nýtslu av innkrevjingarskipanum, sum finnast frammanundan. Roknað verður tó við eini ávísari øking í

Úr:
Løgtingsmál nr. 72/2009: Uppskot til løgtingslóg um almenna Heilsutrygd